# Drotningin sýnir fram í Listaskálanum

**Nú um dagarnar hava listaverk hjá Margretu Drotning verið at sæð í Listaskálanum í Havn. Hetta eru myndir hjá Drotningini, sum eru prentaðar í nýggju bíbliuútgávuni**

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Tað er ikki á hvørjum degi, at Margreta sýnir fram í Føroyum. Tey, sum hava áhuga at síggja arbeiðið hjá Margretu, kunnu fara í Listaskálan í Havn og fáa eina smakkroynd.

Myndirnar, sum hanga har, eru eisini tær, sum eru prentaðar í nýggju Bíbliuútgávuni, sum varð útgivin fyri stuttum.

Hetta er ein sonevnd ættarbíblia, har blankar síður eru fremst til at skriva familjunøvn og minnisverdar hendingar. Henda bíblian varð útgivin á føroyskum, donskum og grønlendskum samstundis.

Hans Jacob Joensen, bispur, heldur tað vera náttúrligt, at drotningin er við til at seta dám á hesa felagsútgávu, tí hon er umboð fyri Grønland, Føroyar og Danmark.

– Drotningin er eisini meira enn bara áhugað fyri kirkjuligum viðurskiftum, og tað er ein stórur fyrimunur. Hon er ikki bara við sum drotning men eisini sum kristið menniskja, sigur bispur.

Henda bíblian er eisini tann, sum er lættast at lesa við teimum størstu bókstavunum. Týðingina eiga Jákup Dahl og K.O. Viderø.

Bispurin heldur tað vera eitt gott hugskot, at drotningin hevur myndprýtt bókina. Serliga dámar honum væl ta myndina, sum Gamla Testamentið byrjar við. Har er eitt træ við einum krossi ovast.



*– Drotningin er eisini meira enn bara áhugað fyri kirkjuligum viðurskiftum, og tað er ein stórur fyrimunur. Hon er ikki bara við sum drotning men eisini sum kristið menniskja, sigur bispur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum frostmarkið og 4 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | ÷10 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | ÷9 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | ÷6 |
| Bukarest | ÷1 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 10 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 14 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 32 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 959 hPa. við Skotland fer í landnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 947 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer eystureftir.




Eitt lágtrýst, 966 hPa. í útsynning úr Føroyum fer um Føroyar hóskvøldið og fer síðani norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/01 kl. 06[00]–25/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALL




Avfallið: 14,0 mm – mált frá 24/01 kl. 06[00]–25/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 100,3 mm


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG




12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes


## VESTFALLSKYRRINDI

24. jan.: Tendring/Mánin longst frá jørðini
1. febr.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. jan | 08:04 | 20:26 | 07:04 | 19:26 | 07:19 | 19:41 | 10:04 | 22:26 | 11:04 | 23:26 | 06:19 | 18:41 | 05:19 | 17:41 | 08:19 | 20:41 | 09:19 | 21:41 | 07:49 | 20:11 | 09:04 | 21:26 |
| 27. jan | 08:46 | 21:06 | 07:46 | 20:06 | 08:01 | 20:21 | 10:46 | 23:06 | 11:46 | – | 07:01 | 19:21 | 06:01 | 18:21 | 09:01 | 21:21 | 10:01 | 22:21 | 08:31 | 20:51 | 09:46 | 22:06 |
| 28. jan | 09:26 | 21:45 | 08:26 | 20:45 | 08:41 | 21:00 | 11:26 | 23:45 | 00:06 | 12:26 | 07:41 | 20:00 | 06:41 | 19:00 | 09:41 | 22:00 | 10:41 | 23:00 | 09:11 | 21:30 | 10:26 | 22:45 |
| 29. jan | 10:03 | 22:21 | 09:03 | 21:21 | 09:18 | 21:36 | – | 12:03 | 00:45 | 13:03 | 08:18 | 20:36 | 07:18 | 19:36 | 10:18 | 22:36 | 11:18 | 23:36 | 09:48 | 22:06 | 11:03 | 23:21 |

www.sosialurin.fo